umhvørvisstovan

P/F Varðin Pelagic
Postbox 67
Havnalagið 11
810 Tvøroyri
Føroyar

Argir hin 17. september 2024
Málsnr.: 24/06322-40
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Katrin Haraldsdóttir Jensen

# Góðkenning av ætlan um protein- og lýsivirki hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri

Umhvørvisstovan góðkennir hervið ætlan hjá P/F Varðin Pelagic um at gera útfylling út á sjógv, at byggja goymslubygning, protein- og lýsivirki og av samlaða virkseminum hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri. Góðkenningin er givin við heimild í § 21, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum við seinni broytingum.

## 1. Heimild

Sambært § 21, stk. 1 í lógini um verju av havumhvørvinum skulu verkætlanir á sjónum og fram við strondini, sum hava týðandi ávirkan á náttúru og umhvørvi, ikki setast í verk uttan góðkenning frá landsstýrismanninum. Góðkenningar sambært § 21, stk. 1 kunnu sambært stk. 2 ikki veitast fyrr enn mett er um avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi. Sambært stk. 3 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um innihaldið í metingunum sambært stk. 2, og sambært stk. 4 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um, hvørjar verkætlanir og virksemi skulu góðkennast sambært stk. 1. Hesar heimildir eru við skrivi frá Innlendismálaráðnum hin 12. oktober 2011 lagdar til Umhvørvisstovuna.

Umhvørvisstovan tók hin 22. mars 2023 avgerð um, at verkætlanin at gera útfylling út á sjógv, at byggja goymslubygning, protein- og lýsivirki og av samlaða virkseminum hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri skuldi góðkennast sambært § 21, stk. 1 í lógini, og at P/F Varðin Pelagic skuldi lata gera eina umhvørvisárinsmeting, sum lýsir ávirkan á náttúru og umhvørvi av bygging og rakstri av samlaða virkseminum hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri. Grundgevingin fyri hesum er m.a., at ætlaða verkætlanin, umframt at fevna um øki á landi, eisini fevnir um øki á sjónum og í sjóvarmálanum, og at fyritøkur til framleiðslu av fiskaúrdráttum sambært punkti F7 í fylgiskjalinum til løgtingslóg um umhvørvisvernd er flokkað sum serliga dálkandi virksemi, og má tí metast at kunna hava munandi ávirkan á umhvørvið.

Umhvørvisárinsmetingin skuldi lýsa ávirkanina frá bæði verandi virksemi hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri og virksemi í sambandi við útfylling á sjógv, bygging og rakstur av goymslubygningi, Protein- og lýsivirki.

# 2. Umsókn og málsviðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 22. februar 2024 umhvørvisárinsmeting fyri verkætlanina hjá Varðanum Pelagic at gera útfylling á sjógv, goymslubygning, Protein- og lýsivirki havnarlagnum á Tvøroyri. Umhvørvisstovan hevði nakrar viðmerkingar, sum vórðu sendar Varðanum Pelagic, og tann 27. februar fekk Umhvørvisstovan endaligu umhvørvisárins-metingina.

## *2.1. Hoyring*

### 2.1.1. Almenn hoyring

Umhvørvisárinsmetingin varð hin 1. mars 2024 løgd til almenna hoyring. Tá freistin at koma við viðmerkingum var úti 19. apríl 2024, hevði Umhvørvisstovan fingið fýra viðmerkingar.

#### Viðmerkingar frá Livilig Kor á Tvøroyri

Áhugabólkurin Livilig Kor á Tvøroyri sendi viðmerkingar í trimum umførum. Tvey tey fyrru skrivini vóru sera lík og eru tí viðgjørd saman.

Í fyrru skrivinum *"Viðv. Kunngerð / lýsing frá Umhvørvisstovuni hin 1. Mars um Umhvørvisárinsmeting hjá Varðanum Pelagic til hoyring"*, verður gjørt vart við at ætlaða protein- og lýsiframleiðslan er serliga dálkandi virksemi, sum sambært kap. 5. í løgtingslóg um umhvørvisvernd skal hava umhvørvisgóðkenning. Umframt at kunnað var um, at umhvørvisárinsmeting og møgulig góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini ikki fevnir um árin á búseting og býarmiðju.

Umhvørvisstovan er greið yvir, at ætlaða protein- og lýsiframleiðslan er fevnd av kap. 5. í løgtingslóg um umhvørvisvernd, og hevur Umhvørvisstovan fingið umsókn um umhvørvisgóðkenning til protein- og lýsivirki hjá Varðanum Pelagic. Umhvørvisstovan viðgerð umsóknina, og verður verandi umhvørvisgóðkenningin fyri virksemið hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum eisini viðgjørd og dagførd, so at ein samlað umhvørvisgóðkenning verður gjørd fyri alt virksemið hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri.

Umhvørvisstovan er eisini greið yvir, at umhvørvisárinsmetingin og ein møgulig góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini ikki fevnir um árin á bústaðarøki, men einans um árin á sjónum og fram við sjóvarmálanum. Árin á bústaðarøki verður tó viðgjørt í umhvørvisgóðkenningini, sum virksemið hjá Varðanum Pelagic eisini skal hava áðrenn arbeiðið kann fara í gongd.

Virksemið hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri skal sostatt hava góðkenning sambært bæði havumhvørvisverndarlógini og umhvørvisverndarlógini.

Í fyrru skrivinum við viðmerkingum frá Livilig kor verður eisini víst á kap. 9 í umhvørvis-verndarlógini, sum snýr seg um kortlegging og planlegging. Livilig kor vísir á, at sambært kap. 9 hevur landsstýrismaðurin í umhvørvismálum ein týðandi leiklut í lendis- og kommunuplan-

legging, og at í býarskipanini fyri Tvøroyrar kommunu verður víst til týdningin av, at greiður skilnaður er millum búseting og dálkandi virksemi, og at fyriskipast skal soleiðis, at neilig árin í breiðum týdningi, verða umgingin.

Umhvørvisstovan ásannar, at § 48, § 49, § 50 og § 54 í kap. 9 í umhvørvisverndarlógini eru lagdar til Umhvørvisstovuna at umsita. Sannroynd er tó, at parturin um kortlegging og planlegging í umhvørvisverndarlógini ongantíð er tikin í nýtslu og tískil er heldur eingin ætlan fyri støðu av virkjum gjørd. Sostatt finnast ikki onnur planleggingaramboð enn býarskipanin og byggisamtyktin. Tað er kommunan, ið er planleggingarmyndugleiki og siðvenja hevur verið, og er, at kommunurnar taka støðu til staðseting av serliga dálkandi virkjum við grundarlagi í galdandi býarskipan og byggisamtykt, og hetta heldur Umhvørvisstovan seg til.

Í skrivinum verður eisini víst á, at talan er um trygdarfrástøðukrøv millum búseting og virksemið við goymslu og nýtslu av størri nøgd av evnafrøðiligum og vandamiklum evnum. Í umhvørvisgóðkenningini verða treytir settar til m.a. kemikaliugoymslur.

Í seinna skrivinum frá Livilig Kor *"Ískoyti til viðmerkingar til Umhvørvisárinsmeting/Varðin Pelagic á Tvøroyri"* verður sagt, at verkætlanin hjá Varðanum Pelagic longu er byrjað, tí at fylt er upp út um galdandi byggisamtyktarmark. Sagt verður, at tað er Varðin Pelagic, ið hevur fylt grót út í sjóøkið uttan nakra vitan um hetta á Tvøroyrar kommunu.

Fyri at fáa greiðu á hvat er farið fram, hevur Umhvørvisstovan hugt eftir loftmyndum, dronu-myndum og øðrum av økinum gjøgnum árini. Umframt at Umhvørvisstovan hevur spurt Varðan Pelagic nær økið eystan fyri verandi bygning varð fylt út. Út frá myndunum sæst, at økið ikki var fylt út tá ið virkið brendi í 2017, men at tað var fylt út í 2019. Sambært Varðanum Pelagic varð økið eystanfyri fylt út tá ið virkið bleiv bygt uppaftur í 2017. Greitt verður eisini frá, at Varðin Pelagic ikki er byrjað uppá at gera útfylling eystureftir, tí byggiloyvi er ikki fingið enn. Sambært Varðanum Pelagic er útfyllingin ikki avsluttað frá uppafturbyggingini í 2017, og at ætlanin var at avslutta útfyllingina við dekkgróti og fáa avstemmað reyðu linjuna við byggisamtyktina á mynd 1. niðanfyri.



Mynd 1. Verandi útfylling eystanfyri virkið hjá Varðanum Pelagic og byggisamtyktarmark.

Varðin Pelagic upplýsti eisini, at onkur hevur lagt tilfar út á økið síðan 2022, og at okkurt av hesum kanska er farið í útfyllingina. Varðin Pelagic gjørdi vart við trupulleikan í apríl 2023 og er samskiftið við Tvøroyrar kommunu um hetta sent Umhvørvisstovuni.

Umhvørvisstovan metir, at frágreiðingin frá Varðanum Pelagic samsvarar við tað, sum Umhvørvisstovan hevur staðfest út frá myndum av økinum, og tað er, at økið eystan fyri virkið varð fylt út í sambandi við bygging av virkinum aftaná eldin í 2017. Treyt verður sett um, at Varðin Pelagic sendur Umhvørvisstovuni eina frágreiðing, tá ið nýggja útfyllingin er liðug, við myndum, sum vísa, at útfyllingin er innanfyri byggisamtyktarmarkið.

## Viðmerkingar frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sendi inn viðmerkingar, sum vístu á starvsøkið hjá HFS, sum kunnu verða ávirkað av virkseminum hjá Varðanum Pelagic. Víst varð til matvørðulógina, djórasjúkulógina og alilógina. Serliga hevði frárenslið frá virkseminum áhuga, og hvussu hetta møguliga kann ávirka laksaalingina á Trongisvágsfirði.

Umhvørvisstovan hevur í seinni samskifti við Jens Dam á HFS tosað um hesi viðurskifti. Jens Dam vísti á, at tað møguliga hevði verið betri um frárenslið lá hinumegin fjørðin. Alt eftir hvønn veg streymurin rekur, hevði verið best, um útlátið ikki lá so, at tað rekur beint ímóti aliøkinum. Varðin Pelagic fer at gera streymmátingar á fjørðinum áðrenn útleiðingin verður løgd út, so tað skuldi verið møguligt at tikið hædd fyri hesum, tá avgerð verður tikin um

staðsetingina. Treytir verða settar um, at staðsetingin av útlátinum frá spillvatnsleiðingini tekur hædd fyri aliøki A-15.

Avtalað varð, at Umhvørvisstovan sendir góðkenningarskrivið til hoyringar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, og at stovnarnir møguliga eisini hava fund um hetta, tá tað er sent til hoyringar.

## Viðmerking frá eigara av sethúsum og nærmasta granna hjá Varðanum Pelagic

Eigari av sethúsum, sum liggja 40 metrar frá markinum millum keiøkið og bústaðarøkið viðmerkir, at Varðin Pelagic síðst í umhvørvisárinsmetingini velur at útiloka ávirkan á fólk og bústaðarøki. Viðkomandi undrar seg yvir, at Varðin Pelagic kann søkja um góðkenning til ein part av § 21 í havumhvørvisverndarlógini og útiláta árin á fólk og umhvørvið.

Umhvørvisárinsmeting og tilhoyrandi góðkenning sambært §21 í havumhvørvisverndarlógini fevnir einans um árin á sjónum og fram við sjóvarmálanum, ikki árin á bústaðarøki, sum liggja burtur frá sjóvarmálanum. Tí er tað rætt gjørt av Varðanum Pelagic ikki at taka árin á bústaðarøki við í umhvørvisárinsmetingina. Árin á bústaðarøki verða tó viðgjørd í umhvørvisgóðkenningini, sum virksemið hjá Varðanum Pelagic eisini skal hava, áðrenn arbeiðið kann fara í gongd.

Í skrivinum verður eisini átalað, at tað, sum er skrivað um virkið, ikki samsvarar við tekningarnar. Nøkur dømi verða nevnd t.d. at transformatorurin er teknaður norðanvert virkisbygningin, kloss upp til bústaðarøki, men í frágreiðingini verður skrivað, at hann liggur inni í virkinum. At kemikaliigoymsla er nevnd í frágreiðingini, men er ikki við í tekningini. Eisini verður víst á, at fýra lýsitangar eru nevndir, men at man ikki veit hvar teir skulu vera, og at teir ikki eru við á nakrari tekning.

Umhvørvisstovan hevur samskift við Varðan Pelagic um hesi viðurskifti. Varðin Pelagic greiðir frá, at transformarastøðin er flutt nakrar ferðir. Upprunaliga vildi man hava hana inni á virkinum, men tað varð ikki pláss, og tí varð støðin flutt í annan bygning norðan fyri virkið, sum víst á tekningini í fylgiskjali 1. Av misgáum er teksturin í árinsmetingini ikki rættaður til. Kemikaliigoymsla er ikki endaliga teknað inn nakrastaðni enn. Men verður hon staðsett í bygninginum norðan fyri virkið, har orkumiðstøðin eisini verður staðsett. Har er rúm tøkt vestureftir í bygninginum, sum kann gerast til kemikaliugoymslu. Teir fýra lýsitangarnir verða væntandi staðsettir sunnan fyri verandi virki, og fara ikki at síggjast frá norðursíðuni, tí teir vera ikki hægri enn virkisbygningurin. Sí mynd 2. niðanfyri.




Mynd 2. Markering vísir ætlaða staðseting av lýsitangum.

Sambært viðmerkingunum í skrivinum metir viðkomandi, at kemikaliigoymsla, oljutangi, skorsteinur, dampkókarar og dieselmotorar ikki skulu leggjast kloss upp at bústaðarøki, við stórum árini og ampa fyri nærmastu grannar og fólkið í nærumhvørvinum. Viðmerkt verður eisini, at um ein ólukka hendir við nøkrum av hesum, verða nátturan og umhvørvið ávirkað munandi orsakað av placeringini. Hildið verður, at Varðin Pelagic hevur eina skerpaða ábyrgd fyri trygdini fyri umhvørvi og fólk, tí at ein vanlukka longu hevur verið á virkinum, har tað tíbetur var ættin henda dagin og eitt hart arbeiðandi sløkkilið á landi og sjógvi, ið gjørdi, at nærmasta grannalag ikki brendi í grund og fólk lótu lív.

Ávirkan á bústaðarøki verður, sum nevnt omanfyri, ikki viðgjørt í umhvørvisárinsmetingini og hesum góðkenningarskrivi, men tað verður viðgjørt í umhvørvisgóðkenningini, sum virkið hjá Varðanum Pelagic eisini skal hava.

Uppskot til treytir í góðkenningini varð sent Varðanum Pelagic til viðmerkingar tann 31. mai 2024. Varðin Pelagic hevði nakrar viðmerkingar til treytina um, at arbeiðið við at fylla grót út, kann ikki fara í gongd fyrr enn kommunalu spillvatnsleiðingarnar, sum eru í fjøruni eystan fyri Varðan Pelagic, og tí vera innan fyri nýggju útfyllingina, eru førdar longur út á fjørðin og í minsta lagi út um nýggju útfyllingina. Varðin Pelagic greiddi frá, at tað ikki ber til at leggja leiðingar, áðrenn grótútfyllingin byrjar, leiðingar mugu leggjast í keiina, og tí má hetta gerast samstundis sum keiin verður gjørd. Umhvørvisstovan hevur orðað treytina øðrvísi, so hon samsvarar við, hvussu arbeiðið verður gjørt.

### 2.1.2. Uppskot til góðkenning til viðmerkingar hjá Varðanum Pelagic

Uppskot til góðkenning varð hin 11. juni 2024 sent Varðanum Pelagic til viðmerkingar. Varðin Pelagic hevði nakrar smávegis rættingar og nágreiningar til upplýsingarnar í góðkenningarskrivinum. Umhvørvisstovan hevur tikið hettar til eftirtektar og broytt tekstin samsvarandi.

P/F Varðin Pelagic kunnaði um, at tað er møguligt, at grót eisini verður siglt til útfyllingina. Umhvørvisstovan metir ikki, at hetta fer at økja um ávirkanina á umhvørvið, tí Varðin Pelagic

hevur ætlanir um at leggja út flótisperrur og samla inn plastleivdir, og treytir verða settar um hetta í Umhvørvisgóðkenningnini fyri virksemið.

P/F Varðin Pelagic viðmerkti eisini viðmerkingina frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um, at tað var betri, um frárensl̈ið lá hinumegin fjørðin. Hetta metir Varðin Pelagic ikki, tí tað verður mett at rákið inn á fjørðin er á sunnaru síðuni og Varðin Pelagic kann ikki leiða spillivatn út har sum rákið førir útlátið inn á fjørðin aftur. Eisini er vatninntakið hjá virkinum á sunnaru síðu. Hetta verður væntandi staðfest, tá streymkanningar eru gjørdar av fjørðinum. Treytir eru settar til staðseting av útlátinum, og verður Heilsufrøðiliga Starvsstovan hoyrd í málinum. Umhvørvisstovan metir tí, at tá ið streymmátingar eru gjørdar, fer at vera møguligt at finna eina staðseting fyri útlátið, sum allir partar kunnu góðtaka.

### 2.1.3. Uppskot til góðkenning til hoyringar

Uppskot til góðkenningin varð hin 21. juni 2024 send P/F Varðin Pelagic, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Tvøroyrar kommunu til hoyringar. Freistin at koma við viðmerkingum var 19. Juli 2024.

Varðin Pelagic og Tvøroyrar kommuna høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið til góðkenning.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevði nakrar viðmerkingar til staðsetingina av spillvatnsútlátinum frá virkinum, í mun til vandan fyri smittu. Sambært viðmerkingunum frá HFS er vandamálið fyri smittu nógv størst í mun til aldan fisk, men veiddur fiskur kann eisini hava sjúkur sum kunnu smitta laks. Í skrivinum verður sagt, at landsdjóralæknin metir tað verða týdningarmikið at forða fyri smittu sambært §9 í djórasjúkulógini, og somuleiðis verður viðmerkt, at Bakka-frost ynskir, at spillvatnsleiðingin frá Varðanum Pelagic liggur so langt frá aliøkinum á Trongisvágsfirði sum møguligt, og í minsta lagi soleiðis, at frástøðukrøvini í §9 í rakstrarkunngerðini verða hildin. Í viðmerkingunum nevnir HFS, at stytstu frástøðukrøv galda fyri aldan fisk hjá sama alara á sama firði, er eitt frástøðukrav á í minsta lagi 1 km frá einum frárensli frá smoltstøð á landi til eina verandi sjógvalistøð á sama firði. HFS viðmælir, at spillvatnsleiðingin í minsta lagi heldur hesi krøv. HFS nevnir eisini at tey hava tað fatan, at neyðugt er hava tøka vitan um vatnskiftið á firðinum, herundir skjalfest rák og streymlýsingar, fyri at taka støðu til staðseting av spillvatnsútleiðingini frá virkinum.

Umhvørvisstovan hevur í hesi góðkenning sett treytir um frástøðu til aliøki A-15, og at tá kanningar eru gjørdar av rákinum á fjørðinum, og støða skal takast til staðseting av munnanum á útleiðingini, skal atlit takast til aliøki A-15, so rákið frá útlátinum frá spilli-vatnsleiðingini ikki rekur beint móti aliøki A-15. Av tí, at hetta eru strangari treytir enn rakstrarkunngerðin ásetur fyri at tryggja at sjúka ikki verður spjadd, metir Umhvørvisstovan treytirnar at vera nøktandi.

Uppskot til góðkenning var ikki sent áhugabólkinum Livilig kor til hoyringar, tí Umhvørvisstovan metti ikki at Livilig Kor er partur í málinum um góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini. Tann 18. juli søkti Livilig kor um alment innlit í hoyringina av

uppskoti til góðkenning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic á Tvøroyri. Umhvørvisstovan játtaði umbønini um innlit og sendi viðkomandi skjøl sama dag.

Tann 19. juli sendi Livilig kor skriv við viðmerkingum til hoyringarskrivið umframt myndir og videobrot av útfyllingini eystan fyri virkið hjá Varðanum Pelagic. Harumframt sendi Livilig kor umbøn um at fáa  longda freist at koma við fleiri viðmerkingum. Umhvørvisstovan kunnaði í telduposti Livilig kor um at góðkenningin, sambært havumhvørvisverndarlógini, fyri virksemi hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri ikki var send teimum til hoyringar, tí Umhvørvisstovan metti ikki at Livilig Kor var partur í málinum um góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini. Hóast hetta segði Umhvørvisstovan, at um Livilig kor hevði fleiri viðmerkingar, sum kundu upplýsa málið, so kundu viðmerkingar sendast inn í seinasta lagi 26. Juli. Tann 26. Juli sendi Livilig kor eitt kæruskriv við viðmerkingum umframt tvey fylgiskjøl við donskum vegleiðingum.

Í Viðmerkingunum sendar inn tann 19. juli verður víst á, at verkætlanin hjá Varðanum Pelagic longu er byrjað, tí at fylt er upp út um galdandi byggisamtyktarmark. Í viðmerkingunum sum Livilig kor sendi inn til almennu hoyringina av umhvørvisárinsmetingini var eisini gjørt vart við hetta. Sum greitt frá í viðgerðini av almennu viðmerkingunum til umhvørvisárinsmetingina, so var øki eystanfyri virkið hjá Varðanum Pelagic fylt út í sambandi við at virkið bleiv bygt uppaftur aftaná eldin í 2017 og er útfyllingin tá farin útum byggisamtyktarmark. Umhvørvisstovan hevur ikki kravt umhvørvisárinsmeting sambært havumhvørvislógini til hesa útfylling og umhvørvisgóðkenning er heldur ikki kravd. Henda útfylling var gjørd áðrenn Umhvørvisstovan í mars 2018 tók avgerð um, at krevja umhvørvisgóðkenning í sambandi við útfyllingar á sjógv tá ið plastleivdir vóru í grótinum. Hetta er gjørt við heimild í §28 í løgtingslóg um umhvørvisvernd. Umhvørvisstovan hevur sostatt ikki sett nakrar treytir til útfyllingina, sum var gjørd í samband við at virkið hjá Varðanum Pelagic var bygt uppaftur. Umhvørvisstovan metir tí, at tað at útfyllingin tá er farin útum byggisamtyktarmark er eitt má fyri Tvøroyrar kommunu.

Á myndunum og videobrotinum, sum livilig kor hevur sent Umhvørvisstovuni, sæst, at seinastu árini er ymiskt tilfar í fleiri umførum koyrt í og lagt omaná útfyllingina eystan fyri Varðan Pelagic. Umhvørvisstovan hevur eisini verið á staðnum, og kann staðfesta hetta. Tað er týðiligt, at ymiskt tilfar so sum betong, múrsteinar og jarn, er lagt út á økið. Varðin Pelagic upplýsir, at tað ikki eru tey sum hava lagt tilfar á økið, og sum nevnt í viðgerðini av almennu hoyringini, hevur Varðin Pelagic fyrr boðað kommununi frá, at onkur hevur lagt tilfar har. Umhvørvisstovan kann ikki út frá myndunum siga, hvør tað er sum hevur lagt tilfar á øki. Tað, at tilfar er lagt á økið, ávirkar ikki málsviðgerðina av góðkenning av verkætlanini sambært havumhvørvisverndarlógini.

Livilig kor vísir í viðmerkingunum á, at tað er brot á bæði náttúrufriðingarlógina og býarskipanarlógina at útfyllingin er farin út um byggisamtyktarmark og at ymiskt tilfar seinni er lagt í og út á útfyllingina. Umhvørvisstovan umsitur ikki hesar lóggávur, og verður tað tí ikki viðgjørt í hesum máli.

Viðvíkjandi kæruskrivinum, sent tann 26. juli, hevur Umhvørvisstovan í telduposti kunnað Livilig kor um, at endaliga avgerðin um góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini enn ikki var tikin, og tí bar ikki til at kæra avgerðina. Umhvørvisstovan hevur tí ikki sent kæruskrivið víðari til umhvørvismálaráðið. Umhvørvisstovan upplýsti eisini, at tá ið ein avgerð er tikin, og góðkenningin verður lýst alment, er kærufreistin fýra vikur.

# 3. Lýsing av virkseminum og ætlaðu útbyggingini

Fiskaarbeiði hevur verið á havnarlagnum á Tvøroyri í meira enn 100 ár, og er virksemið nógv broytt gjøgnum tíðina. Virksemið hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri byrjaði í 2012, og var verandi virkið bygt í 2017/2018, eftir at gamla virkið brendi niður.

Í umhvørvisárinsmetingini er verkætlanin og virksemið lýst, og mett er um tað ávirkan á náttúru og umhvørvi, sum kann væntast av ætlanini, bæði í sambandi við bygging og rakstur.

## *3.1 Verandi virksemi*

Virksemið hjá P/F Varðanum Pelagic er á matr. nr. 493b, á havnarlagnum í Tvøroyrar kommunu.

Verandi uppisjóvarvirki hjá Varðanum Pelagic tekur ímóti móti makreli, sild, svartkjafti, lodnu, gullaksi og øðrum uppsjóvarfiskasløgum til flakaskering og innfrystingar. Tá virkið varð endurbygt í 2017-2018, legði Varðin Pelagic eina ætlan fyri at kunna framleiða og virðisøkja alla rávøruna, ið kemur inn á virkið. Eisini svartkjaft. Virkið bleiv tá innrættað við hesum fyri eyga, soleiðis at í dag eru umleið 97 % av allari restrávøruni á Varðanum Pelagic at rokna sum matvørugóðska. Eisini blivu 900 $m^2$ av virkisbygninginum settar av til surimi-framleiðslu, og 1.400 $m^2$ í eystara partinum av virkisbygninginum varð sett av til protein- og lýsiframleiðslu.

## *3.2. Víðkan av virkseminum*

P/F Varðin Pelagic ætlar at víðka verandi framleiðslu við einari nýggjari framleiðslu til fiskaprotein og lýsi, har allur avskurður og onnur restrávøra frá verandi framleiðsluvirki verður gangnýtt. Ætlaða framleiðslan er sniðgivin til at kunna framleiða lýsi og protein til matna. Endamálið við nýggju framleiðsluni er at kunna virka (skera) meira av rávøruni, sum verður landað á núverandi virki, og at kunna gagnnýta fesku restrávøruna, sum stendst av virkingini. Harumframt at kunna taka ímóti meira svartkjafti um várið.

Í sambandi við verkætlanina skal millum annað nýggj útfylling gerast, har goymslubygningur til protein og lýsi skal byggjast, og skal verandi bygningur leingjast umleið 16 m í ein eystan. Eisini skal ein orkumiðstøð við tilhoyrandi 60 m høgum skorsteini gerast. Harumframt skal gerast ein goymsla til kemikalii, fýra goymslutangar til protein og fýra goymslutangar til lýsi.

Økið er í byggisamtyktini hjá Tvøroyrar kommunu útlagt sum øki D, hetta er havnarøki, sum er lagt av til havnarendamál (herundir eisini bátahavnir) og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey.



Mynd 3. Støðumynd av verandi virkisbygningi, útbygging, útfylling og nýggjum goymslum.

Útlát verða frá virkinum av spillivatni, royki, larmi o.ø.

Fyritøkur til framleiðslu av fiskaúrdráttum eru flokkaðar sum serliga dálkandi virksemi, ið skulu hava umhvørvisgóðkenning. Í umhvørvisgóðkenningini verða treytir settar um at fyribyrgja og avmarka útlát av dálkandi evnum, óljóði og royki, um burturkast, skráseting o.a.

## *3.3 Framleiðsla*

Á verandi virki vóru 104.000 tons av fiski innvigað í 2022 og var hetta frá 126 landingum. Farmaskip vóru inni eftir vøru 38 ferðir og vóru 768 bingjur av liðugtvøru avskipaðar antin við farmaskipi ella Smyrli. 834 flutningsbilar koyrdu aftur og fram við restvørðu, ið skuldi til annan framleiðara av mjøl og lýsi.

Eftir ætlan fer nýggja virksemið at framleiða 40.000 tons av proteini og 16.000 tons av lýsi um árið. Tann parturin av restrávøruni frá høvuðsframleiðsluni, sum ikki er av matvørugóðsku, umleið 3 %, fer ikki til protein- og lýsivirkið, men væntast at verða sýruviðgjørd.

## *3.4 Leingjan av verandi virkisbygningi*

Nýggja anleggið til framleiðslu av proteini og lýsi til matna er sniðgivið til at rúmast í núverandi virkisbygningi. Tó má bygningurin leingjast umleið 16 metrar eystureftir fyri at

rúma skrubbarum og øðrum. Vanligt er, at henda útgerð stendur uttandura, men Varðin Pelagic hevur valt at hava tað innandura fyri at minka um óljóð frá útgerðini.

## 3.5 Grótfylling út á sjógv og spunskei

Grót skal fyllast út á sjógv umleið 17,5 metrar suður úr verandi kaikanti og eystanfyri virkið. Ein upp til 160 m long spunskai verður gjørd á suðursíðuni. Nýggja útfyllingin eystan fyri virkið, verður umleið 10 m burtur frá fjøruni, har hon verður næst, og verður hon umleið 82 metrar breið Víddin á nýggja kaiøkinum verður umleið 9.000 $m^2$, og skulu umleið 60.000 $m^3$ av gróti brúkast til at gera nýggja keiøkið.

Um leivdir av plastspreingileidningum sum flóta eru uppi í grótinum, sum verður fylt út á sjógv, er vandi fyri, at plastleidningarnir spjaðast á sjónum, og fara at elva til dálking av havinum.

Grótið, sum verður brúkt til útfyllingina kemur frá grótgoymsluni við Hvalbiartunnilin.

Í umhvørvisgóðkenningini fyri samlaðu verkætlanina verður treyt sett um, at um plastspreingileidningar, sum flóta, eru í grótinum, skulu tiltøk setast í verk at forða fyri, at spreingileidningar spjaðast í umhvørvinum.

## 3.6 Goymslur

Ein goymslubygningur skal byggjast á nýggja keiøkinum, víddin á bygninginum verður 40x50 m og hæddin 7 m. Goymslubygningurin skal kunna rúma umleið 4.000 tonsum av proteini í sekkjum og ibc-tangum við lýsi.

Fýra goymslutangar ið kunnu rúma 4.000 tons av proteini skulu setast sunnan fyri virkið. Goymslutangarnir eru umleið 20 m høgir og diameturin er umleið 13 m. Farið verður niður í lendið fyri at avmarka hæddina á tangunum.

Á økinum skulu eisini staðsetast fýra lýsitangar. Lýsitangarnir rúma 2.000 tons av lýsi, tangarnir eru 9 m høgir og diameturin er 9 m. Endalig staðseting av lýsitangunum er ikki avgjørd enn, men væntandi verður tað á suðursíðuni á virkinum. Tangarnir verða ikki hægri enn verandi virkisbygningur, og fara teir tí ikki at síggjast frá norðursíðuni. Galdandi reglur á økinum um tangagarðar verður fylgd.

Eitt rúm verður gjørt til goymslu av kemikalium, har kemikalii til cip-reingerð skulu goymast. Kemikalii koma í ibc-tangum. Kemikaliigoymslan verður løgd aftrat orkumiðstøðini og verður gjørd eftir forskriftunum um goymslu av kemikalium.

Í Umhvørvisgóðkenningini verða treytir settar til goymslur.

### 3.7 Orka

Ein orkumiðstøð verður gjørd, har gamla kappróðrarneystið stendur í dag. Hetta verður ein betongbygningur sum fer at fella inn í lendið, har tveir dampframleiðandi ketlar fara at standa, sum brúka gassolju sum brennievni. Á norðursíðuni skal ein 60 metur høgur skorsteinur vera millum virkið og brekkuna niðan til vegin undir Heygnum. Í umhvørvisárinsmetingini var upplýst at víddin á skorsteininum verður umleið 2 metrar. Í seinni viðmerkingunum frá Varðanum Pelagic var sagt at tvørmátið á skorsteininum verður 2-3 metrar har hann er breiðast og smalkast uppeftir. Endalig støða er ikki tikin um hetta enn, men verður hann gjørdur soleiðis sum útrokningar siga er neyðugt fyri ampar ikki vera av útlátinum til luft.

Transformarastøðin hjá SEV er í bygninginum norðan fyri virkið, har orkumiðstøðin er.

Á norðursíðuni verður settur ein oljutangi til 40.000 L til gassolju at dríva ketlarnar til dampframleiðslu. Tangi og rørleiðingar verða niðurgravað.

## 4. Umhvørvisárin undir bygging

Byggitíðin verður 1,5 ár og verður arbeiðið gjørt í vanligari arbeiðstíð.

### 4.1 Plastdálking frá útfylling av kaiøki

Í tunnilsgrótinum frá Hvalbiartunnlinum eru plastleivdir frá Nonel spreingileidningum. Tá grótið verður koyrt á sjógv, verða plastleivdir skolaðar av grótinum og fara at flóta í sjónum ella reka uppá land alt eftir hvussu vindur og streymur eru. Fyri at forða sum mest fyri dálking frá plastleivdum, ætlar P/F Varðin Pelagic at leggja sperru út um økið, har grót verður fylt út.

Í árinsmetingini verður eisini greitt frá, at meðan arbeiðið fer fram, er neyðugt við jøvnum millumbilum at kanna fjørðin uttan fyri verkætlanarøkið fyri plastleivdir og at plastleivdirnar skulu latast til IRF.

Í umhvørvisgóðkenningini verða treytir settar til avbyrging av økinum, insavnan av plastleivdum o.a.

### 4.2 Ferðsla

Fyri at flyta grótið úr Hvalba til kaiina á Tvøroyri verður mett at neyðugt er við umleið 7.500 lastbilum, ið klára at flyta áleið 8 $m^3$. Hetta arbeiðið verður mett at strekkja seg yvir 8 mánaðir. Grótið verður flutt yrkadagar, millum kl. 08.00 og 22.00. Í miðal fara umleið 100 lastbilar at koyra til og frá kaiøkinum um dagin. Um partur av grótinum verður siglt til útfyllingina lækkar mongdin av lastbilum.

### 4.3 Óljóð, støv og ristingar

Meðan bygt verður, kann roknast við nakað av óljóði, støvi og ristingum.

Í byggitíðini, sum er umleið 1,5 ár, kann árin vera av óljóði. Sambært árinsmetingni kann óljóð væntast frá spunsarbeiði, men tíðarskeiði har spunsað verður, er sera stutt. Eisini kunnu væntast ristingar frá byggiarbeiðinum, tá ið tað verður spunsað og tá ið tung ferðsla er til útfyllingina. Nakað av støvi kann koma frá graviarbeiði og øðrum, men metir P/F Varðin Pelagic at hetta primert er jørðstøv og leggur seg skjótt í nærumhvørvinum.

Í umhvørvisgóðkenningnini fyri virkið verða treytir settar til óljóð o.a.

### 4.4 Burturkast

Burturkast frá byggingini verður skilt sambært vegleiðing frá IRF og síðani latið til IRF.

## 5 Umhvørvisárin aftan á útbygging

Tá ið útbyggingin er liðug kann væntast meiri skipaferðsla og meiri aktivitetur á virkjum og á havnarlagnum enn í dag.

### 5.1 Útlát á sjógv

Virkið leiðir í dag alt spillvatn í kommunala spillvatnsleiðing, sum gongur 150 metrar út frá kaikantinum. Kølivatnið frá varmavekslaranum verður leitt beinleiðis út beint við keikantin.

Í sambandi við útbyggingina er ætlanin at leingja spillvatnsleiðingina, so hon liggur so langt út til fjarðarmunnan sum gjørligt, har streymviðurskiftini gera, at einki lívrunnið tilfar hópast upp. Streymkanningar skulu vísa, hvar og á hvørjum dýpi, best er at leggja spillvatnsleiðingina.

Tá ið útbyggingin av virkinum er liðug, verður sjógvur frá skrubbarum, kondensat og kølivatn frá varmavekslaranum leitt óreinsað í spillvatnsleiðingina. Samanlagda nøgdin av hesum spillvatni er um 1.058 $m^3/h$, harav kondensatið er 3,7 %. Tað verður nakað av $NH_3$, TMA og CO í útlátinum. Alt annað spillvatn fer umvegis reinsing, áðrenn tað fer í spillvatnsleiðing á sjógv. Hetta umfatar vatn frá framleiðsluni, vasking av framleiðsluhølum og framleiðsluútgerð, dálkað kondensat, spillvatn frá fólkarúmum, verkstaði og smiðju.

Framleiðslu- og vaskivatn verður leitt umvegis filturbond í luftflotatiónstanga, har mest møguligt av lívrunnum tilfari verður reinsað frá, áðrenn vatnið fer í spillvatnsleiðingina. Spillvatn frá fólkarúmum fer umvegis rottanga í spillvatnsleiðingina, meðan útleiðing frá verkstaði og smiðju verður leitt umvegis oljuskiljara í spillvatnsleiðingina. Yvirflatuvatn, har dálkandi virksemi kann væntast, verður leitt gjøgnum sandfiltur og í spillvatnsleiðingina. Har einki dálkandi virksemi er, verður yvirflatuvatnið leitt beinleiðis út á sjógv. Reinsutiltøkini eru framd fyri at avmarka ávirkanina á lívið í sjónum og á botninum mest møguligt.

Í umhvørvisárinsmetingini skrivar Varðin Pelagic at alt spillvatn og og framleiðsluvatn verður leitt í nýggju leiðingini, men sambært viðmerkingum frá Varðanum Pelagic verður hetta møguliga broytt til, at einans framleiðsluvatn verður leitt í nýggju leiðingina, meðan spillvatn frá folkarúmum verður leitt í kommunalu spillvatnsleiðingina. Hetta fyri at halda kloakkvatn og framleiðsluspillvatn atskilt.

Treytir verða settar um, at staðsetingin av útlátinum frá spillvatnsleiðingini tekur hædd fyri aliøki A-15. Í umhvørvisgóðkenningini verður eisini sett treyt um, at sýni skulu takast av spillvatninum áðrenn tað verður leitt út, markvirði verða sett fyri ymisk evni í spillvatninum og treyt verður sett um at botnkanningar skulu gerast við útlátið.

## *5.2 Útlát til luft*

Avkastluft fer at innihalda luft frá framleiðsluni umframt NOx og CO frá kelilanlegginum. P/F Varðin Pelagic metir tað verða sera ósannlíkt at nýggja framleiðslan fer at føra til, at nakað støv verður spjatt út í umhvørvið umvegis skorsteinin. Orsøkin til hesa meting er, at øll luft frá fremleiðsluni verður reinsað í sjógvskrubbarum áðrenn luftin verður leidd út gjøgnum skorsteinin. Ætlanin er at brúka “indirect steam” turkarar, og avdampurin frá turkarunum verður vaskaður í einum partikulvaskara, áðrenn hann verður sendur til spillhita-inndampara og koagulatorar. Her verður størsti parturin av dampinum kondenseraður út, og restin verður síðani liðugt kondenserað í einum restgas-kondensatori. Eftir hetta er bara luft eftir, sum verður leidd til skrubbarar til luktreinsing, áðrenn luftin verður beind til skorsteinin. Hetta merkir, at møguligt støv frá turkarunum verður vaskað út, og endar sum BOD í kondensatinum, ikki í luftútlátinum frá skorsteininum. Hetta er sostatt eitt útlát á sjógv, og sum nevnt áður er ætlanin at spillvatnsleiðingin skal leggjast har streymviðurskiftini eru somikið góð, at eingi lívrunnin evni savnast upp á botni.

Roykgass frá diesel ketlunum verður leitt út gjøgnum skorsteinin, einki fer á sjógv.

Øll liðugvøra verður handfarin í lukkaðum skipanum inni á virkinum og pakkað antin í sekkir ella flutt í goymslutangar. Tískil er einki útlát av støvi á sjógv. Til avskiping í bulk verður ein lukkað skipan brúkt. Fyri at avmarka, at støv kemur út í umhvørvið, ætlar P/F Varðin Pelagic at brúka flutningsfør, ið hava lukkaðar goymslutangar, tá ið hetta er møguligt.

Samanumtikið væntast ikki, at støv, roykur ella evni frá luftreinsingini fara at ávirka lívið á sjónum og botninum.

Ì Umhvørvisgóðkenningini verða treytir settar til útlát til luft.

## *5.3 Óljóð, ristingar og ljós*

Óljóð kann koma frá sjálvum virkinum og frá uttanduraaktivitetum, sum hoyra til virkið, so sum skipaferðsla, landing og avskiping. P/F Varðin Pelagic metir ikki at óljóðið ávirkar lívið í sjónum ella á botni.

P/F Varðin Pelagic væntar ikki, at ampar standast orsakað av ristingum frá nýggju framleiðsluni. Fyri at fyribyrgja ristingum verður skjóttgangandi útgerð, so sum dekantarar, seperatorar og ventilatorar sett á vibratiónsdemparar og fáa fleksiblar yvirgangir, so vibratiónir ikki forplanta seg í bygninginum og víðari út í umhvørvið. Fyri at kókarar ikki skulu føra til

ampar við ristingum hevur P/F Varðin Pelagic gjørt av at brúka ein Waste Heat Compact Coagulator (WHCC), ið hevur ein øðrvísi uppbygnað enn vanligir kókarar.

Tá ið arbeitt verður við av og á skiping, er ljósstyrkin á tí partinum av keiini, har arbeiði fer fram, í miðal 200 lux. Ljósamaratur verða sett upp á bygningar ella á steyrar. Fyri at minka um ljósdálking á øki uttanfyri kaiina, hava ljósamaraturini serligar optiskar linsur, ið avmarka ljósspilluna. Uttan fyri arbeiðstíð verður ljósið dempað niður til kunningarljós. Simuleringar av ljósútbreiðsluni vísa, at ljósstyrkin á økinum við nýggja goymslubygningin verður 10-15 lux. Ljósstyrkin minkar síðani niður í 2,5 – 5 lux longur út frá bygninginum.

Í umhvørvisgóðkenningini verða treytir settar fyri óljóð, ristingar og ljós.

## *5.4 Orka*

Orkan ið Varðin Pelagic fer at brúka í sambandi við virksemið kemur frá SEV og frá oljuketlum. Virkisbygningurin verður upphitaður av yvirskotshitanum frá framleiðsluni og hitapumpu, ið er á virkinum í dag. Nýggja framleiðslan fer helst at byrja við at hava tveir dampframleiðandi ketlar, sum brúka diselolju sum brennievni.

Protein- og lýsiframleiðsla er ein sera orkukrevjandi framleiðsla, og førur hetta til útlát til luft. P/F Varðin Pelagic greiður í árinsmetingini frá, at arbeitt verður við at minka um orkunýtsluna. Við at brúka rest-hita í koaguleringsprosessini og við at brúka orku frá avdampingini frá turkarum, kann minkast um orkunýtsluna við umleið 15%. Eisini verður arbeitt við møguleika at kunna brúka grøna orku til framleiðsluna í framtíðini.

## *5.5 Burturkast*

P/F Varðin Pelagic væntar ikki at nýggja framleiðslan førir til onnur sløg av burturkasti, enn tað sum er frá núverandi framleiðslu. Burturkastið frá verandi framleiðslu verður skilt og latið góðkendum móttakara, nýggja framleiðslan fer at fylgja sama leisti.

## *5.6 Ávirkan á djóra- og plantulív í sjónum*

Sum partur av umhvørvisárinsmetingini fyri verkætlanina hevur Biofar gjørt eina lívfrøðiliga støðulýsing av botninum við uppisjóvarvirkið hjá Varðanum Pelagic. Kannaða økið fevnir um ein umleið 120 metra langan tein fram við landi, eystur frá endanum á verandi havnarlagi á Tvøroyri. Kannað er úr sjóvarmálanum til umleið 90 metrar úr landi, svarandi til 15 metra dýpi. Víddin á kannaða økinum er um 10.000 fermetrar.

Í frágreiðingini frá kanningini verður víst á, at fleiri spillvatnsleiðingar renna út í økið, og ávirka alt økið við tilførðslu av lívrunnum tilfari og føðsluevnum. Serliga verður víst á at ein spillvatnsleiðing rennur út í lítlu víkina, har Frobiar Sóknar Róðrarfelag hevur neyst. Hendan víkin er nógv merkt av spillvatnsleiðing, og tí er tann parturin av økinum ikki fevndur av búlendislýsingini.

Lýsingin av botninum vísti at trý búlensissløg eru á økinum. Á innasta partinum úr sjóvarmálanum á umleið 0-2 metra dýpi er taraklæddur klettur, og búlendið húsar einum lutfalsliga fjølbroyttum dýralívi. Djúpari enn 1-2 metur er blandingsbotnur við tveimum búlendissløgum. Eyðkennið fyri bæði hesi búlendi er, at sukurtari í stóran mun fjalir bæði botn og lívi við botnin.

Niðurstøðan í frágreiðingini hjá Biofar er, at búlendið og staðfest sløg, eru øll vanlig í Føroyum og er økið merkt av spillvatnsleiðingini, sum verður veitt út í útnyringspartinum av økinum.

Kanningin hjá Biofar fevnir ikki um fjøru ella annað uppi á turrum, einans botnin niðan fyri vatnskorpuna. Orsakað av, at útfyllingin verður "flutt" útfrá fjøruni, minkar hetta um ávirkanina í hesum økinum.

Samanumtikið verður ikki mett, at sjáldsom ella óvanlig sløg ella búlendi á botni ella fram við sjóvarmálanum fara fyri skeyti ella verða munandi ávirkað av ætlaðu bygginini.

Umhvørvisstovan metir tó, at útfyllingin kann føra til, at enn størri árin verður á umhvørvið orsakað av spillvatnsleiðingunum sum renna út í økið eystan fyri virkið. Tí verður treyt sett um, at spillvatnsleiðingarnar, sum verða innan fyri nýggju útfyllingina, skulu førast út um útfyllingina.

# 6. Avgerð

Við støði í umhvørvisárinsmetingini og øðrum samskifti við P/F Varðan Pelagic metir Umhvørvisstovan ikki, at sjáldsom náttúra á sjónum, á botni ella fram við strondini fer fyri skeytið, at útlát av spillivatni fer at hava skaðilig árin á fjørðin ella at roykur, óljóð ella annað fara at vera til munandi ampa ella skaða fyri umhvørvið á sjónum ella fram við strondini.

Tað verður møguliga nakað av ávirkan á rekreativ virði niðri við fjøruna eystan fyri virkið, men metir Umhvørvisstovan, at tað, at útfyllingin verður flutt útfrá fjøruni og at spillvatnsleiðingarnar, sum ávirka øki, verða førdar longur út, minka um hesa ávirkan.

Umhvørvisstovan góðkennir tí ætlanina hjá P/F Varðin Pelagic at gera útfylling út á sjógv, at byggja og reka goymslubygning, protein- og lýsivirki og av samlaða virkseminum hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri. Góðkenningin er gjørd við støði í umhvørvisárinsmetingini hjá P/F Varðin Pelagic frá februar 2024.

## *6.1 Treytir*

- Góðkenningin er treytað av, at verkætlanin verður framd sum greitt er frá í umsóknartilfarinum og øðrum samskifti millum Umhvørvisstovuna og P/F Varðan Pelagic.

- At Varðin Pelagic sendir Umhvørvisstovuni eina frágreiðing, tá útfyllingin er liðug, við myndum sum vísa, at útfyllingin er innan fyri byggisamtyktarmørkini.

- Tá ið Varðin Pelagic hevur gjørt kanningar av rákinum á Trongisvágsfirði, og áðrenn staðsetingin av útlátinum á spillvatnsleiðingini verður fastløgd, skal P/F Varðin Pelagic tryggja
    - at frástøðan frá munnanum á útlátinum frá spillvatnsleiðingini er í minsta lagi 1 km frá aliøki A-15,
    - at staðsetingin av spillvatnsleiðingini tryggjar, at rákið frá munnanum á útlátinum frá spillvatnsleiðingini ikki rekur beint móti aliøki A-15 og
    - at rákið førir spillivatnið úr landi, og at vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingin ikki førir til slóð í sjónum, uppsavnan av evnum ella aðrar broytingar av umhvørvinum.

- Meðan arbeitt verður við at fylla grót út, skulu kommunalu spillvatnsleiðingarnar, sum eru í fjøruni eystan fyri Varðan Pelagic, og vera innan fyri nýggju útfyllingina, førast longur út á fjørðin og í minsta lagi út um nýggju útfyllingina.
  Varðin Pelagic sendir Umhvørvisstovuni eina frágreiðing um hvussu hetta verður gjørt, áðrenn arbeiðið fer í gongd.

- Útfylling út á sjógv, lendisarbeiðið og byggingin skal skipast soleiðis, at arbeiðið ikki hevur óneyðuga ávirkan djóra- og plantulív og rekreativ virði á staðnum.

Umframt hesa góðkenning skal verkætlanin hava umhvørvisgóðkenning sambært § 26 í løgtingslóg um umhvørvisvernd. Í góðkenningini verða settar treytir til virksemið so sum treytir um spillivatn og annað útlát, óljóð, burturkast, skráseting o.a.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til aðrar møguligar góðkenningar ella loyvi.

# 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýriskvinnuna saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdag.

Sigga Jacobsen, deildarleiðari /

Katrin Haraldsdóttir Jensen, málsviðgeri